MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan floksins

Skúlaár	2020/2021
Skúli	Sandoyar Meginskúli
Floksheiti	9. flokkur
Flokslærari	Anna Johnleyg Hentze
Toymi	Jonathan Warner, Jógvan Vest og Anna Johnleyg Hentze

Ársætlan floksins	*Lýsing av flokkinum* 9. flokkur í Sandoyar Meginskúla er ein livandi flokkur. Í flokkinum eru 24 næmingar, 10 gentur og 14 dreingir. Fakliga spenna næmingarnir víða. Nakrir næmingar hava tørv á sertímum, teir flestu eru miðal fyri fakliga, og aðrir klára seg stak væl í fleiri lærugreinum. Arbeiðslagið í flokkinum er sera gott. 9. flokkur er ein pligtuppfyllandi flokkur við góðum stuðli heimaníframá. Serliga um ein setir flokkinum høg krøv, vísir tað seg, at tey præstera har eftir. Sama er galdandi, um ein slakar við krøvunum, so vísir tað seg at tey gerast órólig og ikki fáa eins nógv burturúr. Sosialt eru næmingarnir sera ymiskir og hava ymiskar fortreytir. Í 8. flokki kundi sigast, at serliga genturnar vóru sera nógv uppdeildar í klikur og vóru selektivar. Hetta sást bæði í fríkorterunum og eisini í tímunum, har tær als ikki kundu arbeiða saman við einum og hvørjum. Fleiri átøk vóru sett í verk fyri at økja um trivnaðin í flokkinum í 8. flokki. Eitt nú vóru fleiri AKT-tímar settir av til at arbeiða við øllum flokkinum, foreldur hjá gentunum skipaðu fyri fleiri kvøldum, har genturnar komu saman og beint fyri korona var eisini meiningin, at dreingirnir skuldu savnast saman við gentunum og øllum foreldrunum. Okkurt átak var gjøgnumført við øllum flokkinum, men fleiri vórðu avlýst vegna korona. Seinasta tíðin í skúlanum í 8. flokki vísti ein heldur róligari flokk, har næmingarnir í

MENTAMÁLARÁÐIÐ

	nógv størri mun harmoneraðu. Her kann hugsast, at hølisviðurskiftini eisini bøttu uppá (tey fluttu floksstovu yvir í kantinuna í høllini). Í mun til trivnaðin í flokkinum er endamálið: • at allir næmingar í flokkinum skulu trívast og kenna seg trygg. • At øll skulu vísa fyrilit og umsorgan fyri hvørjum øðrum og taka ábyrgd fyri egnum gerðum. • At sjálvsálitið hjá hvørjum einstakum næmingi skal mennast. • At eingin næmingur skal taka lut í ella góðtaka, at aðrir næmingar verða happaðir.

Arbeiðslag, reglur o.a.	*Mannagongd viðvíkjandi næmingaarbeiði, heima og í skúla* Heimasetningur verður givin umvegis heimasíðu skúlans. Lærarar leggja heimasetningin inn í seinasta lagi kl 16.00 dagin fyri og kl 16.00 fríggjadag (til tað, sum er fyri til mánadag). Fyri at røkka fakligu málunum, møtir næmingurin væl fyrireikaður upp í skúla og hevur eisini góðan matpakka við. Næmingurin má kenna, at tað er týdningarmikið at koma í skúla hvønn dag og taka lut í teimum tiltøkum, ið eru fyriskipað. Tískil verður eisini protokol førd hvønn dag, eins og foreldur og verjar skulu boða frá, um næmingur ikki kemur í skúla. Hetta kann gerast við at ringja á skúlatelefonina tlf: 361266 Ella við at ringja/senda eini sms-boð til flokslæraran tlf: 256239 Leggjast skal afturat, at um floklærari gerst sjúkur ella av aðrari orsøk ikki er tøkur, so

MENTAMÁLARÁÐIÐ

ber til at heita á Jonathan Warner á tel. 275271. Jonathan er næsti kontaktpersónur floksins.

Reglur í flokkinum, t.d. viðvíkjandi samskifti og atburði

Flokslærari og næmingar hava í felag sett sær niðanfyristandandi mál, sum tey ætla at røkka:

Ein góður flokkur er, tá ið:

- Vit eru fitt við hvønn annan
- Vit hjálpa hvørjum øðrum
- Vit eru vinarlig, meðan vit fylgjast og bjóða hvørjum øðrum uppí
- Vit tosa pent við og um hvønn annan
- Vit virða hvønn annan, fyri tann vit eru
- Vit lata klæðini og tingini hjá hvørjum øðrum fáa frið
- Vit góðtaka ikki happing, og vit siga frá, um happing fer fram

Vit hava ein góðan tíma, tá ið:

- Vit koma inn til tíðina
- Vit sita á okkara fasta plássi
- Vit eru væl fyrireikaði
- Vit eru friðarlig
- Vit koyra hondina upp, tá ið vit vilja hava orðið
- Vit lurta, tá ið onnur tosa
- Vit arbeiða saman og hjálpast at

Hetta eru málsetningar, sum flokkurin sjálvur saman við flokslærara hevur arbeitt við og sett sær. Summir málsetningar eru lættari at halda enn aðrir og onkrir krevja bata.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

	Onnur viðurskifti í flokkinum **Floksins tími** Floksins tími verður hildin regluliga. Umleið triðju hvørja viku. Her kunnu viðkomandi viðurskifti verða tikin upp. Eisini er tað her, at vit arbeiða við floksmenning. Flokkurin hevur avtalað, at tveir næmingar hava kaku við hvørja ferð. Floksins tími kann eisini nýtast til trivnaðarfremjandi spøl, eitt nú borðspøl inni og álits- og samstarvsvirksemi uttandura. **Vit flyta pláss** Til tess at læra næmingar at vera saman við øllum og at venja seg at arbeiða saman við fleiri ymiskum persónum, flyta vit regluliga pláss í flokkinum. Hetta verður gjørt umleið annan hvønn mánað.

Trivnaðar- og undirvísingar-tiltøk t.d.	**Felags upplivingar** Tað hevur stóran týdning fyri samanhaldið í flokkinum at fáa felags upplivingar. Trý foreldraumboð verða vald við skúlaársbyrjan fyri flokkin. Foreldraumboðini skulu skipa fyri minst tveimum trivnaðarfremjandi tiltøkum. Einum á heysti og einum um vári. Lærarin skipar saman við næmingunum fyri tveimum hugnakvøldum um árið.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Skipað verður fyri felags tiltøkum í flokkinum og fyri allan skúlan:

- Seturskúli 19. aug – 21.aug til Vágs
- Hugnakvøld, sum foreldraumboð skipa fyri.
- Hugnakvøld fyri flokkinum, tá ið amerikanska forsetavalið verður (gista á skúlanum)
- Evnisvika vika 37/38
- Jól í dalinum
- Floksveitsla
- Útferðir og evnisdagar beint fyri summarfrítíðina.

Spæliliðið skipar fyri spæli hvønn hósdag. Í hesum fríkorteri skulu allir næmingar vera úti, men tað er vælfrítt, um ein vil luttaka. Tó er 9. flokkur sera aktivur, tá ið Spæliliðið er.